## Gongd á fiskivinnuskúlan

Arbeiðið við at byggja Fiskivinnuskúlan í Vestmanna er nú komið somikið áleiðis, at fundamentið er liðugt stoypt. Harumframt er jørð- og kloakkarbeiðið komið væl áleiðis. Nýggi fiskivinnuskúlan verður bygdur á økinum við ferjuleguna í Vestmanna. Í skúlanum verður pláss fyri 100 næmingum, 3 skúlastovum, einari serstovu, umframt 5 bólkarúmum, auditorium og annað, sum hoyrir til ein skúla. Kostnaðarætlan fyri nýggja Fiskivinnuskúlan er 29 mió. kr. Av Landverkið verður sagt, at miðað verður ímóti, at arbeiðið verður liðugt mánaðarskifti aug./sept. 2008.



## Revurin trívist

Tað er líkt til, at revurin trívist munandi betur í Íslandi nú enn fyrr, og mett verður, at hann er tíggjufaldaður í tali tey seinastu 30 árini. Ringast stóð til hjá revinum miðskeiðis í sjeytiárunum, og tá varð mett, at umleið 1.000 revar vóru í Íslandi. Nú verður hildið, at talið er farið upp um 10.000. Tey, sum fylgja við íslendska revinum, siga, at hann hevur ment seg aftur, tí hann hevur meiri føði nú enn fyrr. Revurin livir serliga av fugli.

# Sum at spæla sjavs í kommununi



**- Vit fáa onga nyttu burtur úr at vera við í Kvívíkar kommunu. Tí ynskja vit heldur at fáa eitt samstarv í lag við vestmenningar, sigur Soffi Egholm, bygdaráðslimur í júst Kvívíkar kommunu. Trupulleikin er bert tann, at restin av bygdaráðnum ikki ynskir tað sama**

KOMMUNUR

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Leynar:** – Hóast vit fegin vilja vera saman við vestmenningum, og hóast vit høvdu fingið munandi meiri burtur úr hesum samstarvinum, so letur tað seg snøgt sagt ikki gera, staðfestir Soffi sum býr í Leynum.

Leynar eru partur av Kvívíkar kommunu, og í løtuni er Soffi teirra umboð í bygdaráðnum. Hetta átti at verið eitt áhugavert, mennandi og spennandi arbeiði. Men Soffi hevur langt síðani sæð, at trupult er hjá teimum smærru bygdunum at fáa nakað ígjøgnum.

Tað tykist – stutt sagt – sum um øll menning í kommununi bert skal verða í Kvívík. Og hetta hendir, hóast minnilutin í bygdaráðnum ferð eftir ferð er komin við uppskotum um, hvussu útjaðarin í kommununi kann mennast.

Fleiri við henni eru tí so líðandi vorðin sannførd um, at tær smærru bygdirnar í Kvívíkar kommunu fáa ov lítið gagn av at vera við í kommununi.

- Vit kundu havt eina góða kommunu sum var í støðugari menning. Men soleiðis sum tað verður stýrt í dag, eru lítlir møguleikar fyri hesum.

- Í ringasta føri kann tað enda við, at fólk fara at flyta hiðani, til dømis til Sandavágs, har grundøki eru at fáa, sigur Soffi við Sosialin.

### Samstarv er neyðugt

Í sínum lívi hevur Soffi ferðast nógv, hevur búð á ymiskum støðum í Føroyum og í Danmark, og hon hevur eisini verið sera virkin á tí politiska pallinum í Danmark.

Tað er við hesi bakgrundini, at hon dugir væl at síggja, at uttan samstarv og góðan felagsskap við onnur, kemur ein ongan veg.

Týdningin av samstarvi fyri at røkka nøkrum málum, merkti hon, tá hon sat sum formaður í fakfelagi og ikki minst sum amtspolitikkari í Viborg í mong ár.

Serligan áhuga hevði Soffi innan tað sosiala økið, har tey brekaðu lógu henni fremst í hug, eins og arbeiðið við mentan, umhvørvi og vegasambandi.

– Hesi 30 árini í donskum politikki lærdu meg greitt, at tú kemur ikki til nøkur úrslit, uttan so at tú lurtar eftir hinum og finnur semjur á henda hátt.

– Tá eg flutti heim til Føroyar í 2001 og varð seinni vald inn í bygdaráðið í Kvívík, upplivdi eg júst tað øvugta. Hetta kom sera óvart á meg, sigur Soffi álvarsom.

### "Gyseligt" orðaskifti

Eftir at hava búð í Danmark í 30 ár flutti hon heim aftur, millum annað tí at henni longdist eftir at merkja, hvussu tað var at búgva aftur í føðilandinum.

Tá hon valdi at búseta seg í Leynum, var hon sannførd um at hon var liðug við alt tað politiska arbeiðið.

– Nei, eg skuldi so einki hava við politikk at gera í Føroyum, hvørki í kommununi ella á løgtingi, slær Soffi fast.

Hon plagdi onkutíð at lurta eftir orðaskiftinum á tingi – eitt orðaskifti sum hon beskrivar sum "gyseligt" og so ófólkaligt, at slíkur málburður hevði verið harðliga átalaður í einumhvørjum donskum amtsráði.

Mongum brestur ætlan, og soleiðis gjørdist tað eisini hjá Soffi. Hon fekk áheitan um at stilla upp til kommunuvalið í 2004, men væntaði ikki at verða vald.

Hóast hon játtaði at vera valevni, undraði tað hana almikið, hví økið ikki hevði ein einstakan lista, heldur enn tveir.

Soffi dugdi væl at síggja,

> *Eg skilji tað so, at tað er ein negativt ladaður arvur frá gamlari tíð sum forðar fyri, at hesar báðar kommunurnar verða lagdar saman í framtíðini*
>
> (Soffi Egholm, Leynar)

> *Vit kundu havt eina góða kommunu sum var í støðugari menning. Men soleiðis sum tað verður stýrt í dag, eru lítlir møguleikar fyri hesum*
>
> (Soffi Egholm, Leynar)

> *Seinastu 100 árini er fólkatalið í Kvívíkar kommunu einans vaksið við 150, meðan fólkatalið í grannabygdini Vestmanna er vaksið við 1000 í sama tíðarbili*
>
> (Soffi Egholm, Leynar)



*Minnilutin í Kvívíkar kommunu fær ikki nógvar sømdir. - Tað er sum at spæla sjavs - tað er okkara og tykkara, onga tíð VIT, siga bygdaráðslimirnir Soffi Egholm úr Leynum og Tórarinn Didriksen av Válunum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*